






# Kapping + venjing

Flestu kappingarnar vara einar 3-4 dagar, men lið, sum vitja okkum – og teirra familjur og fjepparar – hava aloftast hug at vera hjá okkum í í minsta lagi eina viku. Tá er lagamanni at leggja eina venjingarlegu afturat kappingini – kanska saman við nøkrum feriu-uppliving.

Á tann hátt ber til at fáa enn meira burtur úr venjingar-vøllunum hjá sponsku landsliðunum, her vit eisini hava havt fleiri føroysk lið á venjingarlegu umframt mong ensk – teirra millum ungdómar hjá Manchester City, Liverpool Elite Academy, Bury FC, Church of England o.ø. (Sí yvirlit yvir nakrar gestir á aftastu síðu).

Innihaldið er tað sama, sum er lagt fram á síðunum frammanfyri við tí einasta muninum, at venjingarlegan er styttri. Hevur hetta tykkara áhuga, gera vit fegin eitt uppskot um eina skrá saman við tykkum.



